VIÐMERKING

Sosialurin – ósannindi og propaganda

TINGKVINNA TJÓÐVELDISFLOKSINS
Annita á Fríðriksmørk

Sosialurin er vorðin eitt fyrilitarleyst propagandablað. Sakligheitin, sannleikin og allar journalistiskar grundreglur verða offraðar fyri at náa tí eina málinum: At sverta Tjóðveldisflokkin og stuðla leiðarum Javnaðarfloksins.

Einaferð nevndist tað "Føroya Social-Demokrat". Tað var erligt. Seinni bleiv tað "Sosialurin - Frælsi, javnaður og brøðralag". Eisini tað var erligt. Øll vistu, at hetta var eitt politiskt málgagn, sum hugdi at samfelagnum gjøgnum serligar brillur. Og øll lósu blaðið við neyðugum fyrivarni.

Soleiðis vóru øll tey partapolitisku bløðini: Politiskt litað, men erlig.

Men so ein dagin varð kunngjørt, at Sosialurin var eitt "tíðindablað". Hvør skal siga: Nú skuldu javnaðarbrillurnar takast av, og samfelagið lýsast sum tað var.

Tað er eingin fráboðan komin um, at tær reyðu brillurnar eru settar aftur á nøsina. Sosialurin roynir framvegis at selja seg sum eitt tíðindablað.

Og tað er ikki erligt. Tí sannleikin er, at ongantíð áður hevur redaktiónin á Argjum verið so politiskt stýrd, sum nú. Ongantíð áður eru sakligheitin og sannleikin sett so uttarlaga, sum tey verða á Argjavegi 26 í dag.

Fjald propaganda

Í dagsins politikki hevur Føroya Javnaðarflokkur ein syndarligan leiklut. Hann hevur ongi konstruktiv íkast á nøkrum øki. Tað einasta hann ger, er at vera ímóti. Og tað, hann fyrst og fremst er ímóti, eru roynd-irnar at vinna Føroyum tjóðarfrælsi. Og hetta er Javnaðarflokkurin. Flokkurin sum m.a. vildi frælsi. Og stórsta arbeiðið ímóti tjóðarfrælsi verður gjørt á Sosialinum. Blaðnum, hvørs redaktión setir alt inn upp á at seta fullveldisætlanina í ringt ljós. Og serliga Tjóðveldisflokkin og leiðarar hansara.

Tey politisku tíðindini verða nærum altíð viðgjørd við hesum greiða endamáli.

Persónar, sum eru ímóti føroyskum tjóðarfrælsi, verða leitaðir upp, og teirra meiningar varpaðar út uttan ein einasta kritiskan spurning.

Persónar, sum taka undir við royndunum at vinna okkum tjóðarfrælsi, verða tagdir burtur ella fáa politiskt mótspæl frá blaðfólkinum umgangandi.

Tað ringasta er kortini, at ósannindi aftur og aftur verða førd fram, hóast blaðfólkið veit um tey, og at stórar yvirskrivtir verða gjørdar, sum ganga beint ímóti prógvføstum veruleikum.

Lat meg bert taka nøkur dømi úr rúgvuni.

Ábyrgdin hjá ting- og landsstýrismonnum

Tjóðveldisflokkurin hevur opið ásannað, at vit í ávísum førum hava havt trupulleikar av framferðini hjá okkara politikarum. (Í mun til aðrar flokkar, har slíkt verður tagt burtur og fjalt).

Vit hava sett krøv til landsstýrismenn og løgtingsmenn, og avleiðingar eru tiknar av truplum málum. Alt varð gjørt púra opið, og nógv skriving var í Sosialinum.

Men Sosialurin viðger ikki líknandi mál hjá javnaðarfólki, hóast hann veit um tey.

Og redaktiónin ikki bara tigur, tá tað snýr seg um javnaðarmenn. Hon fer longur enn so. Hon gav t.d. lesarunum beinleiðis misvísandi upplýsingar, tá ein kanningarstjóri staðfesti, at Jóannes Eidesgaard sum landsstýrismaður hevði borið fíggjarnevndini ósannar upplýsingar í málinum um bygnaðarbroytingar.

Er tað uppgávan hjá einum "tíðindablaði"?

Og hví skrivaði Sosialurin onki um, at tingmenn hava fingið 90.000 kr. árliga í kostnaðarendurgjaldi fyri at búgva í Suðuroy, hóast teir búgva í Havn?

Hugsið tykkum skrivingina, um talan her hevði verið um tjóðveldismenn.

Vaska 80'ini av sær

Herfyri kom kanningin um 80-árini út í bók. Hon staðfestir beinleiðis lógarbrot, fusk og ábyrgdarloysi hjá leiðandi politikarum.

Men Sosialurin valdi ein annan vinkul. Hann valdi at geva fyrrverandi leiðara Javnaðarfloksins møguleika at kasta alla ábyrgd frá sær uttan ein einasta kritiskan spurning. Lógarbrotini komu ikki á forsíðuna. Boðini um, at Atli Dam helt tað vera "lætt at vera bakklókur", vóru týdningarmeiri.

Síðani var kanningin til viðgerðar á tingi, og nógv áhugavert varð ført fram.

Sjálv skjeyt er upp, at tað átti at verið heitt á ákæru-myndugleikan um at kanna, hvørt grundarlag var fyri at ábyrgda stovnum ella persónum rættarliga út frá frágreiðingini.

Men Sosialurin valdi ein annan vinkul. Hann valdi at fokusera uppá tær grovu ákærur og lygnir, sum ein javnaðarmaður undir orðaskiftinum setti fram ímóti einum tjóðveldismanni í sambandi við ein barnagarð á Sandi.

Tað, sum stóð í frágreiðingini um 80-árini, var satt. Tað, sum javnaðarmaðurin førdi fram, var ósaklig hunddálking og lygn.

Men Sosialurin fokuseraði uppá lygnina.

Orsøkin var eyðsædd: Sannleikin hevði rakt Javnaðarflokkin. Lygnin rakti Tjóðveldisflokkin.

Fullveldismótstøðan

Sosialurin hevur fleiri ferðir tosað við framstandandi fólk um fullveldi, og felags fyri hesi útvaldu hjá Sosialinum er, at hesi harðliga átala fullveldistilgongdina, og tað í stórt uppsettum greinum. Tað er so tað. Men hví fáa hesi bara leiðandi spurningar? Hví verða ongir kritiskir spurningar settir teimum, sum vilja geva fullvelisætlanini mønustingin. Hóast hesi sum oftast hava havt stórt vald og stóra samfelagsliga ávirkan í tíðini, tá ið Føroyar fóru á heysin undir heimastýrinum?

Er tað tí blaðstjórin vil geva sínum lesarum kunnleika og innlit? Ella er endamálið at agitera móti fullveldisætlanini?

Hví spyr Sosialurin ikki fyrrverandi landsstýrismenn sum Dánjal Pauli í Búðini, ella fyrst valda býráðslimin í Tórshavnar Kommunu Jákup Suna Joensen um teirra støðu til tjóðarfrælsi?

Nei, har er eingin áhugi. Tey, sum eru áhugaverd, eru Óli og Ingeborg. Atli og Pauli. Birgir Danielsen. Erling Olsen. Poul Nyrup Rasmussen. Ole Stavad. Thomas Arabo. Bjarni Djurholm. Jørgen Niclasen.

Øll tey, sum so ella so kunnu nýtast til at skapa yvirskriftir sum siga, at fólk ikki skulu stuðla fullveldisætlanini.

Onkur annar sløðist uppi ímillum viðhvørt. Men endamálið er eyðsæð. Tað er ikki upplýsing. Tað er propaganda.

Politikarar og teirra mistøk

Tá ein landsstýrismaður hjá Tjóðveldisflokkinum í sinnismuni leyp framav og segði ljót orð, gjørdist hetta stór gøla — og tað er eisini í lagi. Hann bar seg skeivt at, og ábyrgdin er hansara.

Men Sosialurin breyt allar vanligar siðvenjur hjá føroyskum blaðfólki í hesum máli.

Øll vita, hvat politikarar siga við blaðfólk millum ár og dag — og fáur politikari hevði sloppið undan trupulleikum, um samrøður vórðu bandaðar á henda hátt — og enntá spældar alment.

Tað er eisini vanligt, at keldan til eina grein sleppur at góðkenna greinina, áðrenn hon verður prentað.

Men um Sosialurin vil hava eina aðra siðvenju, hví verður so ikki fylgt upp?

Hví verður ikki skrivað um hendingar, tá eitt nú javnaðarpolitikarar beinleiðis hótta og fara harðliga fram úti á Sosialinum?

Hví verður ikki skrivað um javnaðarpolitikarar, sum leggja trýst á bæði blaðleiðslu og blaðfólk?

Ella tá politikarar í øðrum flokkum siga orð, ið høvdu fingið orðini hjá áðurnevnda landsstýrismanni at sæð út sum bagatellir?

Tað finnast eisini javnaðarmenn, sum kunnu loypa framav í sinnismuni. Hvussu ber tað til, at teirra illsinnisgleps ongantíð koma á forsíðuna á Sosialinum sum stórar gølur?

Hví tekur Sosialurin einstakar politikarar burturúr, og ger teir til nakað serligt í mun til restina.

Kann tað hugsast, at tann politiski liturin spælir inn?

Ósannindi uttan rætting

Í fleiri greinum hevur Sosialurin endurgivið tjóðveldistingmannin Signar á Brúnni fyri at siga, at avtalur eru brotnar í sambandi við sjónvarpsmálið og landsstýrissess hansara.

Undirritaða kann vátta, at hetta er skeivt. Eingin avtala varð brotin. Formaður Tjóðveldisfloksins gjørdi greitt frá byrjan, at ongin nýggjur landsstýrismaður skuldi setast, uttan so, at Signar á Brúnni góðtók hetta. Ikki fyrr enn hetta var greitt, varð farið undir at velja annan landsstýrismann.

Í fyrsta blaðnum í ár 2001 er aftur ein samrøða í Sosialinum, har tað verður sagt, at Tjóðveldisflokkurin hevur brotið egnar reglur um val av landsstýrismanni. Blaðmaðurin staðfestir í samrøðuni, at Tjóðveldisflokkurin skal hava samtykt nýggjar reglur um, at í minsta lagi trý skulu innstillast til starvið. Síðani sigur hann, at hesar reglur eru brotnar.

Hetta er ikki rætt. Fyri tað fyrsta hevur Tjóðveldisflokkurin ikki slíka reglugerð. Fyri tað næsta so vórðu 4 ymisk evni í uppskoti meðan málið varð viðgjørt í flokkinum

Eg veit fyri vist, at Sosialurin hevur fingið umbøn um at rætta hesi ósannindi, men hevur ikki gjørt tað.

Suðuroyggin til javnaðarfólk

Í sambandi við málið um útgerðarhavn í Suðuroynni, verður Tjóðveldisflokkurin enn einaferð gjørdur til syndabukk í fleiri greinum í Sosialinum. "Tíðindaflutningurin" er tann vanligi: Eingin kritisk viðgerð av øðrum flokkum, meðan Javnaðarflokkurin verður sagdur at vera tann einasti, ið vil Suðuroynni væl.

Hetta er grov manipulasjón. Sannleikin er, at Javnaðarflokkurin oyðileggði málið fyri suðuroyingar. Í eini roynd at vinna politiskt, gjørdi flokkurin hetta málið til partapolitikk frá byrjan. Og tað gjørdi hann hóast hann visti, at kom partapolitikkur uppí, fór Suðuroyggin at fáa veruligar trupulleikar.

Og ein og hvør kann eisini skjótt staðfesta, at Tjóðveldisflokkurin hevur gjørt og fer at gera alt fyri, at løgtingsins samtyktir verða settar í verk — eisini hon, sum sigur at, at virksemi frá oljuvinnuni eisini verður lagt til Suðuroyar.

Skulu trupulleikarnir hjá Suðuroynni veruliga viðgerast sum politiskt mál í Føroyum, so hevði tað sanniliga verið Javnaðarflokkin, kikarin átti at verðið settur á. Tað er jú bara í Suðuroynni, at Javnaðarflokkurin er sterkasti flokkur. Men hvussu væl hevur hetta gagnað oynni? Hvussu hevur skilið t.d. verið á Tvøroyri? Og er stórsti og sterkasti flokkurin í oynni ein av orsøkunum til skilið? Átti Sosialurin, sum hevur Suðuroynna sum nærum fastan tátt í blaðnum, ikki eisini at kanna um stórsti og sterkasti flokkurin í oynni kundi lagt sín politikk um, til gagns fyri oynna, - heldur enn flokkin?

Eingin virðing fyri øðrum

Flestu tjóðveldispolitikarar hava eftirhondini so ringar royndir av Sosialinum, at tey hætta sær ikki at tosa við fólk frá blaðnum.

Aftur og aftur brýtur blaðfólkið tað grundleggjandi álit, tú mást hava á fólki, skalt tú kunna samskifta við tey. Aftur og aftur verða seriøsitetur og virðing fyri øðrum sett fullkomiliga til viks.

Og harvið setur Sosialurin eisini seg sjálvan til viks sum tíðindablað.

Einaferð stóð "frælsi, javnaður, brøðralag" á forsíðuni á Sosialinum.

Skuldi samsvar verið við innihaldið, skuldi í dag staðið "Fals, ójavnaður og bøðilslag".

VIÐMERKING

Eingin øsing

Edmund Joensen

Anfinn Kallsberg, Høgni Hoydal og Jóannes Eidesgaard eru samdir um, at nú skulu allir føroyingar bara slappa av og ikki gera ov nógva baladu, meðan loysingin fer fram. Persónligt briksl hevur í ov stóran mun merkt orðaskiftið um framtíðarstøðu Føroya, halda teir.

Teir eru rørandi samdir um, at politiskur friður má valda, meðan loysingin fer fram. Best var helst, um eingin so mikið sum segði sína erligu meining um politikk í hesum tíðarskeiði.

Hetta var at skilja sum niðurstøðan av sendingini, sum Útvarp Føroya hevði fríggjadagin í seinastu viku. Útvarpið hevði sett fokus á hesa úttalu frá floksformonnunum á teir trimum størstu flokkunum.

Donsku slaktaríðini

Tað rennur einum til hugs, søgan um tá donsku slaktaríðini høvdu funnið út av, at grísarnir skuldu doyvast, áðrenn teir fóru í "prosessina". Sagt varð, at teir høvdu eitt slag av stress, tá ið teir blivu slaktaðir, og tí vóru ikki so góðir at fáast við, sum ynskiligt var. Eisini fingu teir eitt ella annað í nakkan, sum strammaði. Kjøtið bleiv ikki so gott av tí sama heldur, varð sagt.

Fyrimunirnir við at doyva grísarnar vóru fleiri. Teir vóru minni stressaðir, góðskan bleiv betri varð hildið, og størsti fyrimunurin var, at "prosessin" fór nógv stillisligari fram. Balladan við grísunum, sammett við áðrenn, var fyri einki at rokna.

Føroyingar doyvast

Landsstýrið og loysingarpolitikarar tordu ikki at kennast við sítt egna verk og sleptu samráðingarúrslitinum eftir trimum árum. Hesir somu leggja nú á annan bógv, fyri at fáa loysingina gjøgnumførda. Teir eru samdir um, at føroyingar eiga at sissast ella doyvast, so at loysingarprosessin gerst lættari og minni stressandi.

Seinasti húsagangur

Stutt frammanundan at Føroyar fóru á húsagang, bað Sjónvarp Føroya, í eini nýggjársending, formenninar fyri Javnaðarflokkin, Fólkaflokkin, Tjóðveldisflokkin og Sambandsflokkin um at gera eina meting um, hvussu komandi árið fór at roynast.

Teir fyrstu tríggir vóru samdir um, at komandi árið fór at vera munandi betur. Mín egna meting var døpur. Tað fór at enda gali hjá Føroyum.

Óneyðugt er at siga hvat hendi. Føroyar fóru einki minni enn á húsagang aftaná, við teimum óbøtandi menniskjaliv og leiðingum, sum tað hevði við sær.

Søgan endurtekur seg

Fer søgan at endurtaka seg, nú teir tríggir floksformenninir eru samdir um, at alt skal fara stillisliga fram, og at eingin balada skal vera um loysingina?

Sjálvur nokti eg at trúgva, at føroyingar longu hava gloymt tað, sum fór fram áðrenn Føroyar fóru á húsagang, og tað sum fram er farið hesa síðstu tíð av ørskapi undur hesum landsstýrinum.

Eg nokti eisini at trúgva, at føroyingar hesuferð lata seg doyva av sissandi orðum frá floksformonnum úr teim somu loysingarflokkunum.

Eitt er heilt vist: Vit í Sambandsflokkinum fara ikki at lata okkum doyva ella sissa, fyri at loysingin skal fara fram so stillisliga, at eingin varnast fólksins egna fall.

Objektivur tíðindaflutningur, ella … ?

SJÁLVSTÝRISMAÐUR OG FORMAÐUR LANDSFELAGS SJÁLVSTÝRISFLOKSINS
Edvard Hermansen

Eg kvakk við, tá eg í fyrrapartstíðindunum í gjár hoyrdi samrøðu Útvarpsins við borgarstjóran í Hósvík.

Í umrøðuni av einum fundi við góðari undirtøku um floksformansvalið í Sjálvstýrisflokkinum, leggur útvarpsmaðurin niðrandi fyri við at siga, at Helena Dam á Neystabø bóltaði akkurát innum. Útvarpsmaðurin var sjálvur á eykalandsfundinum og visti væl, at hetta var eitt spennandi og sera javnt val, har vinnandi valevni ikki koppaði innum heldur enn hitt tapandi, var nakar stórur tapari.

So mikið harmiligari er tað, tá ið Útvarpið fær tað at ljóða, sum um tað var gjørd ein seravtala við Jógvan Mørkøre um valið og at landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum hevði lovað honum nakað aftur fyri og soleiðis gjørt ein "rossahandil" við borgarstjóran fyri eina atkvøðu til floksformansvalið.

Meg persónliga harmar tað somikið meira, at Jógvan Mørkøre hevur málborið seg, sum hann hevur gjørt, bæði tí at vit kennast væl og tí hann eisini er bygdarmaður mín. Og eg veit, at ætlan hansara als ikki hevur verið at skaða nývalda formannin, eins og eg veit, at tað ikki var tað, sum lá í orðum hansara, men at talan heldur var um gáloysni í einum svari og ein funnin fressur hjá einum hungrandi tíðindamanni, at brúka.

Sum landsfelagsformaður og umboðandi Norðurstreymoy fari eg harðliga at vísa aftur hesum, at nakar rossahandil skal vera farin fram í hesum máli, hvørki frá landsstýrismansins, mínari ella Landsfelagsins síðu.

Tað álit, sum vist varð Helenu Dam á Neystabø á landsfundi Sjálvstýrisfloksins er ikki viknað.

Men harmiligt er tað, at hon aftur nú skal til at stríðast móti býttisligum orðavavstri í fjølmiðlum.

At politikarar gera sær dælt av hesum, varð ikki annað væntandi, tí egin brøgd hava ikki megnað at hevja Jóannes Eidesgaard í eygum føroyingsins. Meinfýsni er eingin dygd.

Etingarólag undir sjóneykuna

Sveinur Tróndarson

Anoreksi og bulimi eru sjúkur, sum hóast tær gerast alt meira vanligar millum ungdóm okkara, fáa alt ov lítla viðgerð í miðlunum. Nú verður ein roynd gjørd fyri at kunna fólk um hesar sjúkurnar, sum á føroyskum ganga undir felagsheitinum etingarólag.

Hon stendur har sum Várharra hevur skapt hana. Kløn, sum eitt piðað, rað, men hon sær tað ikki sjálv. Hon er sjúk, men vil ikki viðganga tað sjálv. Í veruleikanum heldur hon, at hon vigar eitt pund ella tvey ov nógv. Tá tey eru farin av, so fer at líkjast. Hjá okkum, sum hava matarlyst í heldur ríkiligt mát, ljóðar hetta sum tað reina ørvitistos, men hjá mongum ungum – serliga kvinnum – er hetta gerandiskostur. Matur fer ikki í tey, sum líða av hesi sjúkuni, og tað, sum fer niður um, kemur ofta skjótari uppaftur. Tær eru raktar av etingarólagi og tað er, tíverri, ein sjúka, sum vindur upp á seg. Eisini her heima hjá okkum. Sjúkan er ikki nakað nýtt fyribrigdi, minni enn so. Heilt gamlar søgur geva okkum ábendingar um, at henda sjúkan er avgomul, og tað letur til, at tey tá vistu líka lítið til at taka, sum læknarnir gera í dag. Heiluvágur finst eingin, tí slík sjúka grøðist ikki við heiluvági, og at seta nakrar tummilfingrareglar upp fyri sjúkuni, tað er púrasta vónleyst, siga sálarfrøðingar. Í Danmark hava tey seinastu árini havt eitt felag, sum tekur sær av áhugamálunum hjá teimum sjúku, og sum samstundis eisini roynir, at gera vart við trupulleikan í sjónvarpslýsingum. Tí ber í løtuni til hjá teimum, sum síggja danskar rásir um parabol at síggja lýsingar fyri danska felagnum fyri teimum við etingarólagi. Tað var hana vit lýstu í byrjanini. Vandamikil sjúka Tey, sum fáa sjúkuna, hava hjálp fyri neyðini. Bráðneyðuga hjálp. Eingin veit rættiliga hvaðani sjúkan stavar ella hví hon brýtur út, júst tá hon ger, men metingarnar eru nógvar. Sálarfrøðingar kenna heldur ikki orsøkina og teir vita enn minni, hvussu ein patentloysn upp á sjúkan sær út. Orsøkin til tað er, at sjúkan er serstøk fyri hvønn tann einasta sjúkling, siga sálarfrøðingarnir. – Tað eru ikki tveir tilburðir sum eru líka, og tí er tað so torført at viðgera, siga teir. Men er tað torført at viðgera, so er tað alneyðugt at gera júst tað. Neyðugt er at koma í viðgerð so skjótt sum tilber – áðrenn sjúkan fær yvirtakið. Fær hon tað, so kann støðan sum einki gerast lívshættislig. Nógvir sjúklingar eru deyðir av sjúkuni av teirri orsøk at teir eru so illa farnir av sjúkuni, at tað gerst einki. Tað sigur seg eisini á ein hátt sjálvt, at sjúklingar, sum eftir stuttum tíðarbili missa millum 8 og 15 kilo, eru veik tá samanumkemur, og tí skal lítil skelkur til at skræða tey higani. Kortini síggja sjúklingarnir einki sjálvir og millum annað tí er sjúkan so út av lagi torfør at viðgera. Hvussu kanst tú viðgera ein sjúkling, sum ikki heldur seg vera sjúkan.

Fyrilestur og samtala Hóast lítið er at hoyra um etingarólag nú, so hevur tað ikki verið eiðasørt í føroyskum miðlum. Roynt hevur verið at gera eitt sindur burturúr viðhvørt, men tað hevur neyvan verið nóg mikið til at hjálpa um støðuna hjá teimum sjúku og avvarandi teirra, sum mangan kenna seg einsamøll. Tí verður næstu tríggjar dagarnar at koyra undir stirvnaðu umrøðuna og byrjað varð í gjárkvøldið. Í sendingini Tilvera, sum Armgarð Arge skipar fyri, fer ein kvinna, sum hevur stríðst við sjúkuna í fleiri ár, at greiða frá, hvussu hennara lív og levnaður hevur verið við hesi sjúkuni. Fríggjadagin verður fyrilestur á Parnassinum á Hotel Hafnia, har tveir danskir viðgerðarar fara at halda fyrilestur. Tað eru tær báðar Christina Petersen og Inge Christiansen, úr Keypmannahavn, sum fara at greiða frá tí tær vita um sjúkuna og viðgerðina av henni. Fyrilesturin verður klokkan 19, fríggjakvøldið. Seinnapartin leygardagin frá klokkan hálvgun fimm til klokkan hálvgun átta, verður møguligt hjá fólki at ringja inn til tær báðar donsku viðgerðarnarar, sum hava drúgvar royndir í fakinum. tey, sum ringja fáa 20 minuttir í part, og hóast hetta ikki er long tíð, so kann hetta vera neistin, sum aftur birtir lív í nærum slóknaðan veik, harafturat gevur hetta fleiri møguleikan at sleppa framat. Hvørji telefonnummrini eru, sum ringjast kann til, er ikki greitt í løtuni, men hesum verður lýst við fyri seg. Vit kunnu leggja aftur-at, at øll eru hjartaliga vælkomin til fyrilesturin Hóast tað eru ikki nógvar upplýsingar at finna á føroyskum um sjúkuna, so finnast slíkir á heimasíðuni hjá danska felagnum fyri anoreksi og bulimi, sum eitur www.anoreksi-foreningen.dk.